# Fyrsta oljan á Atlantsmótinum tíðliga í 1997

*Gongst sum ætlað sprænir fyrsta oljan upp vestan fyri Hetland úr Foinaven kelduni tíðliga í 97. Síðani fylgir Schihallion á sumri í 98 og møguliga byrjar framleiðsla úr tí risastóru oljukelduni Clair ár 2000. Við hesum trimum stórum oljukeldunum bendir nógv á, at Atlantsmótið verður ein av teimum stóru oljuframleiðlarunum í heiminum - og tá vita vit enn ikki, hvat finst við Føroyar*




*Vit síggja Foinaven og Schiehallion, sum fara undir framleiðslu í 97 og 98 so so Clair, har oljan møguliga sprænir í 2000. Pílurin vísir økið, har Mobil (sí grein á hini síðuni) fer at bora við Jack Bates í 97*



*Petrojarl Foinaven, fyrsta oljuframleiðsluskipið á Atlantsmótinum er nú komið á feltið, stutt frá føroyska markinum, har tað skal verða liggjandi til langt inn í næstu øld*

JAN MÜLLER

Alt bendir á, at Atlantsmótið verður ein týðandi oljulandslutur í komandi øld og møguliga fer at avloysa Norðsjógvin.

Enn er eingin oljuframleiðsla farin í gongd í hesum stóra økinum, men roknað verður við, at Foinaven fer undir framleiðslu í fyrsta ársfjórðingi næsta ár, sigur Jamie Jardine, leiðari á tíðindadeildini hjá BP í Aberdeen við Sosialin.

Teir eru nakað seinkaðir. Ætlanin var, at framleiðslan skuldi byrja tíðliga í 96, men av tí at alt hetta er so nýtt er ætlanin seinkað. BP upplýsir annars, at teir eru sera væl nøgdir við verkætlanina, tí hóast seinking, so verður hon framd uppá mettið.

Í oljuvinnuni verður Foinaven mett sum ein tann størsta og mest spennandi avbjóðingin nakrantíð.

Av tí at arbeitt verður í einum heilt nýggjum øki og á djúpum vatni hevur verið neyðugt at útvikla heilt nýggja tøknifrøði, sum verður sett upp á havbotninum.

Dýpið ger, at tað ber ikki til at brúka vanligar kavarar, men alt má gerast frá skipi ella minni kavbátum.

Nú um dagarnar kom framleiðsluskipið „Petrojarl Foinaven" á Foinaven feltið, har tað skal vera alt árið langt inn í næstu øld og taka oljuna upp úr undirgrundini, viðgera hana og síðani føra hana víðari til serstøk tangaskip, sum so aftur føra hana til lands.

Jamie Jardine frá BP sigur, at ferðin frá spanskum skipasmiðjuni til Foinaven gekk betur enn nakar hevði roknað við. Skipið slapp at royna seg í sera ringum veðri og vísti seg at vera framúr sjógott.

Tann næsta oljukeldan í hesum økinum fer í gongd á sumri í 1998. Tað er Schiehallion, sum liggur stutt frá Foinaven. Skipið, sum skal liggja á hesum feltinum, er í gerð á skipasmiðju í Belfast í Norður-írlandi. Tað verður tað størsta av sínum slag í heiminum. Schiehallion verkætlanin er mett at kosta umleið 10 milliardir krónur, so talan er ómetaliga stórar upphæddir, sum verða brúktar til at fáa í gongd oljuvinnu vestan fyri Hetland - fyri ikki at tosa um tað, sum longu eru lagt í kanningar í økinum. Hesi seinastu 20 árini eru borað umleið 120 brunnar vestan fyri Hetland umframt at har eru gjørdar hópurin av seismiskum og øðrum kanningum.

## Lív í aftur Clair

Tað er annars nógv, sum bendir á, at tað í framtíðini fer at verða nógv virksemi í øllum hesum nýggja oljuøkinum.

Í summar vórðu gjørdar nýggjar royndir at vita um ikki framleiðsla kann byrja frá risastóra oljufeltinum Clair, sum varð funnin fyri 20 árum síðani. Hesar royndir vóru so mikið góðar, at operatørurin BP í løtuni er við at kanna saman við teimum mongu oljufeløgunum, sum eru við í hesum feltinum, hvat skal gerast. Møguliga verður talan um at fara undir framleiðslu í komandi øld ella ár 2000 og at leggja rørleiðingar til lands.

Jamie Jardine frá BP sigur, at teir fara helst undir eina sokallaða appraisal boring í 98. Hetta er tað, sum verður gjørt, áðrenn farið verður undir veruliga framleiðslu.

Clairoljufeltið er tað størsta, sum nakrantíð er funnið á bretskum øki. Tað skal goyma 6 milliardir tunnur av olju. Til samanmetingar goymir Schiehallion niðanfyri eina hálva milliard tunnur.




*Arbeitt uppá framleiðsluskipið til tað næsta oljufeltið vestan fyri Hetland. Schiehallion er í gongd á Harland skipasmiðjuni í Belfast*

*Serútgjørdu skipini Norlift og Iolair stutt frá føroyska fiskimarkinum, har tey gera klárt til fyrstu oljuframleiðsluna vestan fyri Hetland nakrantíð*





*Eitt av „manifoldunum", sum verður sett á havbotnin millum Hetland og Føroyar. Oljan úr Foinaven kelduni skal gjøgnum hendan útbúnaðin*